# Eriksson slapp ikki at keypa

Svenski fótbóltsvenjarin Sven-Gøran Eriksson, sum í fleiri ár var venjari hjá enska landsliðnum, hevur ligið fram við eftir at keypa suðurafrikanska fótbóltsfelagið Hanover Park FC. Eriksson stóð á odda fyri einum bólki, sum vildi keypa seg inn í felagið, men núverandi eigarin av felagnum vil ikki taka av tilboðnum, tí hann roknar við, at felagið verður flutt og bert skal brúkast sum talentvirki hjá Erikson og hansara fólki.



# Ófriður er eitt rák

Formaðurin fyri donsku Divisionsforeningen, Thomas Christensen, heldur at ófriður í sambandi við fótbóltsdystir í Danmark seinastu tíðina, kann verða eitt óheppið rák, sum fer at gera um seg næstu tíðina. - Hetta er sera óheppið, og tí skulu vit nú tosa um, hvussu vit fáa frið og góða trygd á fótbóltsvøllunum í Danmark, sigur hann við Politiken. Fleiri dømi hava verið um ófrið til dystir í Danmark. Mest umtalað hendingin var í sambandi við landsdystin millum Danmark og Svøríki.

B71-HB 2-1 (2-0):

# Bygdamenn settu altjóða hetjur upp á pláss

B71

HB

**Við ongum venjara á beinkinum varð fyrsti heimasigurin hjá sandoyingum í bestu deildini í seks ár væl skipaður og lagdur til rættis**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum eydnaðist tað B71 í fína summarveðrinum sunnudagin at vinna á heimavølli. Sigurin var á kreppuraktu meistarunum í HB, og hann var merkisverdur á so mangan hátt.

Hetta var onnur ferðin í ár, at sandoyingarnir, sum fluttu upp í fjør, vunnu á meistarunum. B71 hevur ikki verið í bestu deildini síðani í 2001. Tí eru tað seks ár síðani, at B71 áskoðarar hava verið vitni til fulla úrtøku á heimavølli í bestu deildini.

Fyri seks árum síðani vann B71 tvær ferðir á heimavølli. Onnur ferðin var ímóti EB/Streymi – 1-0 – og hin ferðin var ímóti – HB! Úrslitið ta ferðina var 3-2. Tað er einki nýtt, at B71 hevur gott tak á HB. Í 2001 spældu hesi bæði feløgini tvær ferðir. Í Gundadali endaði tað við málleysum javnleiki.

Sunnudagin var tað eisini merkisvert, hvørjar manningarligu fyritreytirnar hjá liðunum báðum vóru. Seks av HB spælarunum – Mortan úr Hørg, Rasmus Nolsøe, Kári Nielsen, Jákup á Borg, Rógvi Jacobsen og Christian Høgni Jacobsen - vóru við í altjóða avbjóðingunum ímóti Skotlandi og Italia. Eingin B71 spælari fann náði hjá landsliðsvenjaranum.

Kanska var tað júst hesin altjóða veruleikin, sum var ein av orsøkunum til, at B71 hesa ferð fekk fult á heimavølli.

### Væl skipað heimalið

B71 venjarin segði upp herfyri. Eli Hentze hevur síðani havt ábyrgdina av venjingunum. Hann var á B71 miðvøllinum, og harvið var B71 venjarin ikki á beinkinum.

Kortini var B71 avrikið tilvitað og væl lagt til rættis. Sandoyingar vóru ikki fyrilitarleysir í álopsspælinum. Heldur valdu teir at bíða eftir meistarunum. Tá ið bólturin so varð fangaður, gekk tað fleiri ferðir skjótt og miðvíst fyri seg í umstillingsspælinum.

Clayton Soares var einsamallur á toppinum, meðan Magnus Olsen og Símin Hansen vóru skjótir fram í borðunum, tá ið álopini vórðu sett í verk.

Eitt korter var farið, tá ið fyritreytirnar fyri hesum konseptinum styrknaðu uppaftur meira. Símin Hansen og Clayton Soares áttu uppspælið, og skotinum hjá raska miðvallaranum, Wellington Soares, bilti einki. Bólturin streyk inn í málhornið aftanfyri Marcin Dawid.

Stutt undan steðginum legði B71 seg uppaftur betri á sigurskósina. Hesa ferð átti Símin Hansen mesta partin av málinum, sum venjarin sjálvur varð skrásettur fyri. Eftir framúr skotroynd uttanvert brotsteigin brast bólturin í tvørtræið aftanfyri HB málverjan. Eli Hentze var fyrstur á returinum og so var 2-0.



*Heldur ikki hesa ferð eydnaðist HB at basa B71, sum við sigrinum hevur lagt seg væl fyri miðskeiðis á stigatalvuni*
*savnsmynd*

### HB lítið sannførandi

Støðurnar í sambandi við bæði B71 málini lýstu væl HB avrikið. Meistararnir tóktust allir sum ein at hava fingið skeiva beinið fyrst úr seingini, um teir yvirhøvur vóru útpurraðir!

Hugflogið í álopspartinum var ikki, sum tað ofta hevur verið hjá HB. Taklingarnar vóru ikki neyvar og sannførandi, og í stríðnum um næstu bóltarnar vóru gestirnir í Dalinum sera lítið avgjørdir.

Sum seinna umfarið leið royndi Krzystof Popczynski at gera broytingar og skiftingar, og aftaru menninir vórðu ofta sendir fram á vøllin. HB royndi at trýsta, og heimamenninir vistu, at teirra leiklutur fyrst og fremst var at verja og lúra eftir møguleikum at fara í snarálop.

Símin Rógvi Hansen var brandur millum B71 stólparnar og serliga í brotsteiginum, har høgir krossbóltar ofta vórðu sendir.

Tríggjar minuttir undan leikloki eydnaðist tað miðverjanum Hans á Lag at minka um munin. Hans snittaði bóltin framvið B71 málverjanum. Síðsta løtan gjørdist meiri spennandi, enn sandoyingar við vánaligu heimahagtølunum brígjaðu seg um, men teir riðu stormin av, og altjóða stjørnurnar fóru um Skopunarfjørð við ongum. Bygdarmenninir og útlendsku hjálparmenn teirra á Sandi høvdu syrgt fyri at øll stigini vóru eftir sunnanfyri fjørðin.

# Landsdystirnir kosta nógv

Krzysztof Popczynski var ógvuliga vónbrotin, tá HB enn eina ferð hevði tapt fyri B71.

- Leikliga var dysturin ógvuliga líkur dystinum, sum vit taptu í Havn. Vit hava bóltin nógv, men vit eru ikki nóg konsentreraðir, og tí verður tað fleiri ferðir vandamikið, tá vit missa bóltin í uppspælinum.

*Avrikini hjá tykkum hava verið ógvuliga óstøðug. Hvussu ber hetta til?*

- Tað eru sjálvandi fleiri orsøkir. Men hesa ferð haldi eg, at landsdystirnir avgjørt høvdu sítt at siga. Spælararnir á A-landsliðnum vóru ikki tøkir fyrr enn hósdagin, men teir kundu ikki venja hendan dagin. Og teir á U21-landsliðnum komu ikki til landið fyrr enn fríggjadagin.

- Tað er sjálvandi gott, at vit hava so nógvar spælarar á landsliðnum. Men fyri ein venjara er tað ræðuligt. Vit høvdu at kalla onga fyrireikandi venjing til hesa uppgávuna, og møðin sat enn í spælarunum. Bæði kropsliga, men ikki minst sálarliga.

*Soleiðis, sum úrslitini lagaðu seg í gjár, so mistu tit tó einki í oddinum?*

- Nei, og tað er sum so tað einasta góða, sum hendi í gjár. Vit hava framveigs 15 dystir eftir at spæla, og sjálvur trúgvi eg uppá, at vit kunnu venda gongdini. Men komandi vikurnar verða ógvuliga harðar. Vit hava hálvfinalur í steypakappingini, og tí skulu vit spæla tveir dystir um vikuna, so næstu tvær vikurnar vera sera harðar fyri bæði liðið og meg, sigur Krzysztof.

**-mørk**

# Standa sum ein maður

Jónsvein Thomsen hjá B71 var fegin um, at tað loksins eydnaðist B71 at vinna á heimavølli.

- Hesa ferð skuldi tað verða. Vit høvdu á leið sama upplegg, sum til dystin í Havn, og eisini hesa ferð riggaði kontraspælið væl. Móti endanum komu vit tó undir eitt heilt stórt trýst. Vit settu okkum tó fyri, at hesa ferð skuldi ikki gleppa, og tað eydnaðist so tíbetur.

Um gongdina higar til sigur Jónsvein, at teir á Sandi eru heilt væl nøgdir.

- Vit høvdu sett okkum sum mál, at vit skuldu verað verandi í deildini, og higar til hava so livað upp til ta vónina. Um orsøkina til hetta haldi eg, at tað fyrst og fremst er eitt sterkt kollektiv. Vit stríðast sum ein maður til hvønn tann einasta dyst. Lagið til venjingarnar er framúr, og yvir høvur haldi eg, at vit allir hava tað stuttligt á vøllinum. Kanska eisini, tí vit ikki spæla við rygginum móti múrinum. Men fyrst og fremst er tað ein kollektivur innsatsur, sum hevur borið okkum higartil, heldur Jónsvein.

**-mørk**